






*Nýggja kryvjivirkið til alivinnuna í Norðoyggjum skal undir sína framleiðslu komandi vár. Virkið skal taka ímóti 1500 tonsum av laksi um árið*

# Byggingin gongur væl

**Stóru sperrurnar til nýggja kryvjivirkið í Klaksvík verða í hesum døgum settar upp. Kryvjivirkið skal verða innilokað í hesum árinum**

BYGGING
*Eyðun Klakstein*

Byggingin av nýggja kryvjivirkinum til alivinnuna, sum verður gjørt av vestara havnaøki í Klaksvík, gongur sum ætla.

Tað eru alifyritøkurnar Eystlaks og Faroe Salmon, sum standa aftanfyri nýggja felagið, Kryvjing, og tað verða eisini hesar fyritøkurnar, sum koma at brúka kryvjivirkið.

Í løtuni verða stóru sperrurnar til virkið settar upp, og ætlanin er, at virkið skal verða innilokað í ár. Komandi vár er ætlanin at fara undir virksemið á virkinum.

## Í minna lagi

Kryvjivirkið fer við seinasta plássinum á vestara havnaøki, har tað er vorðið sera trongligt. Ætlanin var, at kryvjivirkið skuldi verða nakað størri, men tað bar ikki til, tí plássið er avmarkað á økinum.

Virkið skal taka ímóti 15000 tonsum av laski um árið, og tað sleppur tað helst at gera longu komandi ár. Tí er virkið í minna lagi, men Eystlaks og Faroe Salmon ætla at klára seg við hesum virki fyribils.

Tá virkið verður klárt fer virksemið á vestara havnaøkið at økjast, og í løtuni er einki pláss eftir at byggja á nærindis.

**Seta nógvar pengar av**

Klaksvíkar kommuna hevur viðgjørt spurningin um havnaøki, og líkt er til, at meira verður gjørt við góðshavnina í Ánunum komandi ár.

Enn er fíggjarætlanin hjá Klaksvíkar kommunu ikki almenn, men líkt er til, at einar fimm milliónir verða settar av til útfylling í Ánunum komandi ár.

Hetta er ein trivaligur partur av samlaðu íløgunum hjá Klaksvíkar kommunu, og kjak hevur verið í meirilutanum um, hvørt hetta er ein røtt íløga at gera.

Nú skal uppskotið um fíggjarætlan ummælast í teimum ymsu nevndunum í býráðnum, og verður eingin stór broyting gjørd eftir ta viðgerðina, verður meira gjørt við góðshavnina í Ánunum komandi ár.

Tosað hevur eisini verið um at útbyggja vestara havnaøkið, men her eru ongar ítøkiligar ætlanir í løtuni.

# Bilstevna í Klaksvík

**Stór bilstevna verður í Klaksvíkar Ítróttarhøll miðskeiðis í november mánaði**

BILAR
*Tíðindaskriv*

Leygardagin 17. og sunnudagin 18. november skipar Klaksvíkar Ítróttarfelag fyri stórari bilstevnu í Klaksvíkar Ítróttarhøll.

Tað er blivin ein afturvendandi táttur, at KÍ-høllin hvørt ár er karmur um stórar bilstevnur, og norðoyingar eru sum heild takksamir fyri, at bilsølurnar geva sær tíð til at pleyga kundarnir í útjaðarøkinum.

Tað er jú altíð ein fyrimunir at sleppa undan at fara til Havnar at hyggja eftir nýggjum bilum. Av tí sama, verða stevnurnar í Klaksvík altíð sera væl vitjaðar, og nógvir bilar verða seldir hvørt ár á sjálvari stevnuni.

Enn hevur tað ongantíð verið nakar trupuleiki at fylla høllina við nýggjum bilum, og fyrireikarnir vænta heldur ikki, tað verður nakar trupuleiki hesaferð.

Fyrireikarnir siga í tíðindaskrivi, at stevnan verður leygardagin 17. og sunnudagin 18. november, og at hon er opin báðar dagarnir frá kl. 16.00 til 22.00. Tær bilsølur sum hava áhuga at verða við, kunnu venda sær til fyrireikarnir á tlf 456398 ella e-mail: nhj@post.olivant.fo.

# Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum, ið gjørdu mær 80 ára føðingardagin 11. august 2001 til ein minnisríkan dag.

Takk fyri vitjanir, gávur, blómur, telegramm og uppringingar.

*Heilsan*
**Borghild Müller**

